# SKRIVSTOVUFÓLK TIL VÁGA FLOGHAVN

Vága Floghavn er í eini menningartilgongd. Flogvøllurin og farstøðin verða útbygd komandi 2 árini. Útbyggingin letur upp møguleikar fyri nýggjum ferðamálum og tilboðum til verandi og nýggjar marknaðir og víðkar um inntøkugrundarlagið hjá Vága Floghavn. Sum liður í menningartilgongdini søkir Vága Floghavn eftir einum skrivstovufólki til umsitingardeildina.

Umsitingardeildin tekur sær í høvuðsheitum av heimasíðurøkt, starvsfólkaviðurskiftum, skrivarauppgávum, skjalasavni, samskipan, móttøku, avtalum við viðskiftafólk, bókhaldi, fíggjarrapportering, fíggjarætlanum, roknskapi og øðrum umsitingaruppgávum.

Skrivstovufólkið skal, við tilvísing til fíggjarleiðara felagsins og í samstarvi við starvsfelagar sínar, luttaka í arbeiðinum við teimum uppgávum, sum umsitingardeildin tekur sær av, umframt øðrum uppgávum í sambandi við virksemi felagsins.

Skrivstovufólkið skal hava hóskandi útbúgving, so sum skrivstovuútbúgving ella líknandi, ella viðkomandi royndir, góð samstarvsevni og duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál.

Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2011, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Regin I Jakobsen á telefon 354400
ella við telduposti á rij@floghavn.fo.

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mars 2011. Allar umsóknir við neyðugum fylgiskjølum verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:
Regin I Jakobsen, teldupost: rij@floghavn.fo

www.floghavn.fo

FAE VÁGA FLOGHAVN

sansir.fo



Kom við 62°N travel

# Oyggjaleikirnir Isle of Wight 2011

Leikirnir vera hildnir 25. juni til 1. juli

Túrurin verður bert gjørdur, um nóg góð undirtøka er. Fyribils tilmeldingarfreist er 23. februar 2011

**Send fyrispurning og tilmelding á linda@62n.fo ella ring tlf 340016 (beinleiðis)**

**Ferðaskrá:**
- 24. juni 2011 Vágar - Keypmannahavn
- 25. juni 2011 Keypmannahavn - London
- 25. juni 2011 Koyra buss (privat til bólkin) og sigla til Isle of Wight (verða koyrd heilt til gistingarhús)
- 25. juni - 2. juli 2011 Gista á Royal Pier Hotel
- 2. juli 2011 London - Keypmannahavn
- 2. juli 2011 Keypmannahavn - Vágar

**Íroknað:**
- Flogferð Vágar - Keypmannahavn - London t/r
- Eina viku uppihald á Royal Pier Hotel í dupultkamari
- Morgunmatur + máltíð um kvøldið
- Flutningur til og frá flogvølli til gistingarhús í Sandown
- Ferðaseðil við ferjuni til Isle of Wight t/r
- Avgjøld




## Royal Pier Hotel
Sandown, Isle of Wight

Prísur fyri hvønn í dupultkamari

**9.800 kr.**

Sosialurin 341800

62°N travel

...so er ferðin byrjað!

62N.fo nú eisini á iPhone og Android

Les meira á 62n.fo

Hoydalsvegur 17 · 100 Tórshavn
Tel: 34 00 00 · booking@62n.fo

Fyrivarni verður tikið fyri villum og broytingum